Nils Finsensgøta 32. 2. Barnabati
Hædd
100 Tórshavn
Faroe Islands
T: +298 522011
T: +298 532011
barnabati@barnabati.fo
www.barnabati.fo

týsdagur, 4. desember 2018

Umsøkjari:
Barnabati
Niels Finsensgøta 32. 2- Hædd
100 Tórshavnn

Nógv børn og ung í Føroyum kenna seg einsamallan við sínum trupulleikum. Síðani 1981 hevur Barnabati arbeitt fyri at lofta hesum børnum. Í Ráðgevingini møta vit nógvum børnum og ungum, sum greiða frá um ymiskt, sum tey føla, at tey ikki kunnu tosa við onnur um. Hetta gevur Barnabata eitt gott innlit í hvat børn hugsa, og hvørjir trupulleikar tey hava. Í okkara arbeiði stremba vit eftir at styrkja um barnsins rættindi, og tí eisini teirra trúgv uppá seg sjálvan, soleiðis at tey hava møguleika til persónliga menning. Barnabati ynskir tí altíð at kunna verða at heita á, um eitt barn ella ein ungdómur hevur tørv á einum at tosa við. Barnabati miðar tí ímóti at økja um upplatingartíðirnar hjá Tú & Eg Ráðgevingini, so at tað ber til at møta enn fleiri børnum og ungum, sum hava tørv á hjálp. Um hetta skal gerast veruleiki, er tørvur á størri fíggjarorku.

Við verandi fíggjarorku, er ikki møguligt at støðugt førleikamenna og økja ráðgevaratoymi fyri at kunna møta øllum børnum og ungum í Føroyum, ið hava tørv á vegleiðing.

Virkisumráði:

**Tú & Eg Ráðgevingin:** Ein anonym ráðgeving til børn og ung.
**Betri vinir:** Undirvísing og amboð til at fyribyrgja happing á dagstovnum og fólkaskúla.
**Mentor:** Eitt upplýsandi, fyribyrgjandi og mennandi tilboð til børn og ung.
**Barnahjálpin:** Jólahjálp, føðingardagshjálp, og hjálp til frítíðarvirksemi til fíggjarliga sperdar barnafamiljur.

Føroyska gransking og tilmæli frá altjóða stovnum, vísa á at tað manglar ein støðug ráðgeving til føroysk børn og ung.

Harafturat vísur føroysk og donsk gransking, at tørvur er á størri átøkum fyri at basa happing á dagstovnum og í fólkaskúlanum.

Vit vilja tí søkja um: 780.000 kr. til Tú & Eg Ráðgevingina
420.000 kr til Betri vinir
Samanlagt: 1.200.000 kr

VIRKISØKI UMSÓKNIN UMFATAR; NÆRRI GREINA:

**Tú & Eg Ráðgevingin**

Tú & Eg Ráðgevingin er til fyri at tryggja børnum og ungum í Føroyum teirra rættindi. Teirra rættindi at hava eina ókeypis, óhefta og anonyma ráðgeving at venda sær til.

Barnabati samskipar sjálvboðið sosialt arbeiði umvegis anonyma ráðgeving til børn og ung. Barnabati hevur fingið tilluta tað Europeiska "Helpline" nummari 116 111. Tað ber ikki til at síggja hvør tað er, ið ringir og tænastan er kostnaðarfrí.

Ráðgevaratoymi er manna av viðkomandi fakfólkum og er millum annað umboða av fólkaskúlalærarum, námsfrøðingum, sjúkrarøktarfrøðingum, sosialráðgevum, sálar-frøðingum og læknum.

Tað er ein grundleggjandi rættur hjá børnum og ungum at verða hoyrd, at tey kunnu bera fram sína áskoðan, og fáa síni viðurskifti lýst, sum staðfest í ST barnarættindasáttmálanum. Børn eiga til eina og hvørja tíð at fáa ta hjálp teimum tørvar. Ráðgevingin er við til at verja og styrkja um hesi rættindi, í at verða hoyrd, eins í teirra rættindum at fáa góðan og fakligan stuðul.

Barnabati hevur síðani 1981 arbeitt við at veita børnum og ungum eina óhefta fakliga ráðgeving. Fyrsta av hesum slag var í *Psykologiska ráðgevingarstovan* hjá Barnabata, ið Jógvan Bæk, sálarfrøðingur hevði ábyrgdina av.

Tú & Eg Ráðgevingin, ið var sett á stovn í 2007 hevur nú drúgvar royndir, og hevur uppbygt eitt gott samstarv við danska systirfelagsskapin *Børns Vilkår* og altjóða felagsskapin *Child Helpline International.* Tú & Eg Ráðgevingin hevur síðani hon var sett á stovn veitt fleiri túsund børnum og ungum hjálp, umvegis kjatt, telefon og brævkassa.

Fyri at Tú & Eg Ráðgevingin, til eina og hvørja tíð skal kunna veita børnum og ungum fakliga, óhefta og dagførda ráðgeving innan alt í viðkemur teimum, skal ein munandi betri fíggjarlig raðfesting til virksemið. Barnabati fær í løtuni 450.000 kr í stuðulsjáttan á Løgtingsins fíggjarlóg til samlaða virksemi felagsins. Um ráðgevingin skal nøkta tørvin á tí støði ST viðmælir, og tann tørv vit umvegis egnar royndir meta er hóskandi, eru samlaðu útreiðslurnar fyri Tú & Eg Ráðgevingina mettar til kr: 720.000.

Tú & Eg Ráðgevingin gevur børnum og ungum eina rødd, sum staðfest í grein 12 í ST Barnarættindasáttmálanum:

Grein 12 *Luttakaralondini skulu tryggja einum barni, sum er ført fyri at orða síni egnu sjónarmið, rættin til frítt at greiða frá hesum sjónarmiðum í øllum viðurskiftum, sum hava*

*samband við barnið; dentur skal leggjast á barnsins sjónarmið í samsvari við aldurin á barninum, og hvussu búgvið tað er.*[1]

Uppgávan hjá Tú & Eg Ráðgevingini er ein sera týdningarmikil liður í at verja børn, og í fyribyrging ímóti ágangi og harðskapi mótvegis børnum sum staðfest í grein 19 í ST Barnarættinda- sáttmálanum.

Grein 19 *Luttakaralondini skulu seta í verk øll hóskandi lóggávulig, fyrisitingarlig, samfelagslig og útbúgvingarlig tiltøk til at verja barnið fyri øllum sløgum av kropsligum ella sálarligum ágangi, skaða ella misnýtslu, vanrøkt ella vanrøknari viðferð, harðskapi ella úrnýtslu, m.a. kynsligari misnýtslu, meðan foreldrini, verjin ella onnur hava barnið undir hond.*[2]

Vit vóna at samfelagið, við hjálp av Tú & Eg Ráðgevingini kann stuðla og hjálpa børnum og ungum í Føroyum, við at til eina og hvørja tíð tryggja teimum eina óhefta og fakliga barna og ungdómsráðgeving. Tað er umvegis teirra egnu rødd, at teirra samfelag verður tilevna og teirra rættindi viðurkend.

**Tilmæli:**

Sálarheilsan hjá Føroyskum miðnámsskúlanæmingum:

"*Vit meta tað vera av stórum týdningi at hava lætt atkomiliga ungdómsráðgeving, har tann ungi skjótt og ómaksleyst kann fáa ráðgeving frá viðkomandi fakpersóni."*[3]

Niðurstøður frá hoyringini í barnarættindum í september 2017:

"*While welcoming the availability of helplines for children in mainland Denmark, Greenland and the Faroe Islands, the Committee recommends that the State party institutionalize the helplines, expand their availability to 24 hours and provide the necessary human, financial and technical resources for their effective functioning".* [4]

Viðmerkingin lýsir: Section 43(b)(1) on Social Programmes:

(b) Social programs to support the child individually and to support the child's family and other caregivers to provide optimal positive child- rearing, for example:
(i) For children: childcare, early child development and after-school care programmes; child and youth groups and clubs; counselling support to children experiencing

---

[1] Kunngerð nr. 6 frá 16. januar 1992 um ST-samtykt frá 20. november 1989 um rættindi barnsins.

[2] Kunngerð nr. 6 frá 16. januar 1992 um ST-samtykt frá 20. november 1989 um rættindi barnsins

[3] Davidsen, A & Skaale, S, (2017) Sálarheilsan hjá Føroyskum Miðnámsskúlanæmingum, Føroyar. Felagið Føroyskir Sálarfrøðingar. s. 21

[4] Concluding observations on the fifth periodic report of Denmark (Faroe Islands) 2017. S 6

difficulties (including self- harm); 24-hour toll-free child helplines with trained personnel; foster family services which are subject to periodic review.[5]

Create Accessible and Child-friendly Reporting Systems' States should establish safe, well-publicised, confidential and accessible mechanisms for children, their representatives and others to report violence against children. All children, including those in care and justice institutions, should be aware of the existence of mechanisms of complaint. *Mechanisms such as telephone helplines - through which children can report abuse, speak to a trained counsellor in confidence and ask for support and advice - should be established* and the creation of other ways of reporting violence through new technologies should be considered.[6]

## Fyribyrgja Happing: Betri vinir

*Eitt fyribyrgjandi amboð ment til børn, fakfólk og foreldur, stíla til dagstovnar og fólkaskúlan*

**"Stórur eftirspurningur eftir Betri vinir - Fri for Mobberi amboðnum"**
**"93% av teim spurdu starvsfólkunum siga, at happing fer fram á dagstovninum"**

At happing fer fram millum børn í Føroyum er staðfest. Mentamálaráðið hevur tikið stig til, at kanningar hava verið gjørdar innan økið í fólkaskúlanum, og tøl frá 2007 og aftur frá 2015 vístu, at 13-15 % av fólkaskúlanæmingum boðaðu frá, at tey høvdu verið fyri happing[7]. Ein føroysk granskingarverkætlan frá 2006 vísti, at talið tá var nakað hægri, tá nærum ein triðingur av øllum 8. floks næmingum í føroysk fólkaskúlanum boðaði frá, at tey høvdu verið fyri happing (Petersen et al., 2010). Henda kanningin vísti eisini, at tey, ið hava verið fyri happing, stríðast við neilig eyðkennir upp á sálarliga óheilsu, so sum tunglyndi, sálarløst og kropslig eyðkennir upp á ampa (Petersen et al., 2013).

Hvussu støðan er innan børn á Føroysku dagstovnunum, vita vit tó ikki, tí okkum kunnugt hevur happing innan dagstovnaøkið ikki verið kannað áður í Føroyum. Tá tað er sagt, hava tekin verið um, at happing eisini er ein avbjóðing longu á dagstovnaøkinum, tí uttan nakra yvirskipaða ætlan, hava føroysku dagstovnarnir seinastu árini í størri og størri mun brúkt danskt tilfar, sum er ætlað at basa happing. Barnabati hevur í hesum sambandi mett, at í

---

[5] Committee on the Rights of the Child General Comment No. 13 (2011) S. 16

[6] Recommendation 8 of the report 'Promotion and Protection of the Rights of Children' - A/61/299: S. 27

[7] https://www.mmr.fo/fo/arbeidsoki/utbugving-og-gransking/folkaskulin/happing/

arbeiðnum fyri at tryggja viðurskifti hjá føroyskum børnum í Føroyum, eiga vit at hava virðing fyri mentanarligu ymiskleikunum,sum kunnu hugsast at vera millum eitt nú Danmark og Føroyar, og tí skilabest at vit nýta føroyskt tillagað tilfar í Føroyum. Tí varð farið undir eina tilgongd at menna eina føroyska útgávu av Fri for mobberi, sum hevur fingið heitið: “Betri vinir”. Her verður dentur lagdur á at styrkja barnafelagsskapin í samstarvi við fakfólki, ið eru um børnini. Tilfarið er sett saman av námsfrøðiligum amboðum og er grundað á eina nýggja fatan av happing, sum sigur, at happing er “tá ein bólkur á ein skipaðan hátt eltir ella útihýsur einum menniskja, og at hetta fer fram á einum stað, har hetta menniskjað er “tvungið” at vera (Hansen, 2003). Tilfarið tekur støði í virðunum tolsemi, virðing, umsorgan og dirvi, tá gransking hevur víst, at happing bert í lítlan mun fer fram í felagsskapum sum byggja á júst hesi virði. Ætlanin tekur støði í granskingarverkætlanini Exploring Bullying in Schools (eXbus.dk), sum javnan verður kannað, eftirmett og tillagað í londunum kring okkum. Frá hesum úrslitum vita vit, at tilfarið hevur gagn. Sí fylgiskjal 4. Fri for Mobberi og Børns Socioemotionelle komepetencer.

Føroyska verkætlanin Betri vinir varð á fyrsta sinni løgd fram í 2015. Fyrsta vegleiðandi skeiðið var á vári 2018 og higartil hava starvsfólk frá 28 stovnum úr 13 føroyskum kommunum verið á skeið; og soleiðis verður verkætlanin higartil nýtt á stovnum í Norðoyggjum, Eysturoy, Streymoy, Vágoy, Sandoy og Suðuroy. Sostatt kunnu vit longu vísa á, at 44% av dagstovnum í Føroyum upp á 9 mánaðar eru byrjað at fyribyrgja happing við føroyska tilfarinum Betri vinir.

Betri vinir er stuðlað av Mentamálaráðnum (veddingarpengar) , Føroya Pedagogfelag og Betri P/F er høvuðsstuðul. Barnabati arbeiðir uttan fíggjarligan vinning, og luttakandi dagstovnarnir rinda tí bert fyri írestandi kostnaðin av amboðunum og vegleiðandi skeiði.

Fyri at tryggja og menna góðskuna í føroyska tilfarinum og hvussu tað verður nýtt, er ein granskingar partur knýttur at sjálvari verkætlanini, stuðlað av Sjúkrakassagrunninum. Forkanningar fara í løtuni fram, og greiningar bygdar á data fingin inn gjøgnum spurnabløð svarað av 302 starvsfólkum býtt á 28 stovnar vísa rættiliga greið úrslit:

- Nærum øll – 97 % - vóru nøgd ella vælnøgd við samstarvið í starvsfólkabólkinum
- Øll vóru antin nøgd ella sera væl nøgd við samstarvi við foreldur/umsorganarpersónar.
- Næstan øll – 93% - mettu, at happing fer fram millum børnini á dagstovninum, hóast tey flestu børnini eisini hava børn at spæla við.
- Nógv tey flestu - 89 % - svaraðu, at starvsfólkini kundu gera nakað fyri at fyribyrgja happing.

- 1⁄4 svaraðu at starvsfólkini nýttu ymiskar hættir at handfara happing.
- Meirilutin hevði áður savnað seg um happing, men 24 % høvdu ikki og bert 3,5 % høvdu skipaðar mannagongdir í handfaring av happing.
- Nærum 80 % hildu, at tey kundu blivið betri til at handfarið ósemjur og arging millum børnini.

Arbeitt verður við at savna inn data, tá verkætlanin hevur verið í gongd í eina tíð. Og tá verður møguligt at fáa eina mynd av, um starvsfólkini meta, at tilfarið Betri vinir hevur ynsktu gagnligu ávirkanina innan dagstovnaøkið.
Komandi ár ynskja vit at kanna um føroyska skúlatilfarið Betri vinir kann fáa eina gagnliga ávirkan á ta happing, sum í dag fer fram millum næmingar í føroysku fólkaskúlunum, og ynskja vit at skapa eina ítøkiliga ætlan ímillum stovnar og kommunur, sí hjáløgdu fíggjarætlan.
Fyri at tryggja fyribyrging av happing millum føroysk børn, og støðugt menna føroyskt tilfar og amboð sum basir happing, er tørvur á á 420.000 kr árliga, umframt 300.000 til gransking (Tað síðstnevnda verður søkt um aðrastaðni)

Samanumtikið kunnu vit út frá tølunum higartil meta:

- at happing fer fram millum børnini á føroysku dagstovnunum.
- at samstarvið millum starvsfólk, og millum starvsfólk og foreldur verður mett gott
- og at starvsfólkunum vantar greiðar mannagongdir og amboð í handfaringini av happing.

Mælt verður staðiliga til:

At skipa eina tilgongd sum fyribyrgir og basir happing á ein granskingargrundaðan hátt. Soleiðis at granskingin eisini fevnir um datainnsavnan frá børnunum og teirra foreldrum/umsorganarpersónum.

Um ynski er at vita meira um virksemi felagsins, koma vit fegin á gátt.

Í vón um vælvild

Vinaliga

Djóni Eidesgaard
Aðalskrivari
Barnabati

# Tú & Eg Ráðgevingin. Fíggjarætlan

| | | |
|---|---|---|
| **Upplýsing og greining** | | |
| Marknaðarføring til børn og ung | DKK | 40,000.00 |
| Greining og hagtøl/eftirmeting til víðarimenning | DKK | 50,000.00 |
| Samanlagt | **DKK** | **90,000.00** |
| **Sjálvboðin (20 fólk)** | | |
| Handbók til ráðgevar | DKK | 15,000.00 |
| Førleikamenning av ráðgevum | DKK | 70,000.00 |
| Ferðaútreiðslur hjá skeiðshaldara (2 ferð árliga + evt. honorar) | DKK | 30,000.00 |
| Rekrutering av sjálvbodnum, harundir lýsingar í fakbløðum | DKK | 5,000.00 |
| Menning av vaktbooking system | DKK | 10,000.00 |
| Samanlagt | **DKK** | **130,000.00** |
| **Karmar og útgerð** | | |
| Útgerð til Ráðgevingina | DKK | 25,000.00 |
| Útreiðslur til Skrivstovuna | DKK | 20,000.00 |
| Heimasíða (harundir www.barnabati.fo/tu & eg, leita í brævkassain og Eg & Lívið) | DKK | 10,000.00 |
| Samanlagt | **DKK** | **55,000.00** |
| **Starvsfólk** | | |
| Eftirútbúgving, førleikamenning, skeið | DKK | 55,000.00 |
| Supervisión | DKK | 50,000.00 |
| Faglitteratur (er eisini til sjálvboðin) | DKK | 10,000.00 |
| Konsulent | DKK | 25,000.00 |
| Ferðaútreiðslur | DKK | 15,000.00 |
| Samskipan | DKK | 350,000.00 |
| Samanlagt | **DKK** | **505,000.00** |
| | | |
| **Fíggjarærlan fyri eitt ár** | **DKK** | **780,000.00** |

# Betri vinir. Fíggjarætlan

| | | |
|---|---|---|
| **Gransking** | | |
| Menning, innsavnan, greining og eftirmeting | DKK | 300,000.00 |
| Verður søkt aðrastaðnis. Samanlagt | **DKK** | **300,000.00** |
| **Tilfar** | | |
| Prentlutir | DKK | 250,000.00 |
| Tekstviðger | DKK | 25,000.00 |
| Myndir | DKK | 25,000.00 |
| Samanlagt | **DKK** | **300,000.00** |
| **Karmar og útgerð** | | |
| Útgerð til skeiðshaldarar | DKK | 25,000.00 |
| Útreiðslur til Skrivstovuna | DKK | 20,000.00 |
| Heimasíða barnabati.fo | DKK | 5,000.00 |
| Samanlagt | **DKK** | **50,000.00** |
| **Starvsfólk** | | |
| Millumlanda samstarv | DKK | 15,000.00 |
| Faglitteratur | DKK | 5,000.00 |
| Ferðaútreiðslur | DKK | 10,000.00 |
| Samskipan | DKK | 350,000.00 |
| Skeiðshaldarar | DKK | 40,000.00 |
| Verður søkt um av Løgtingsins fíggjarlóg. Samanlagt | **DKK** | **420,000.00** |
| | | |
| **Fíggjarærlan fyri eitt ár** | **DKK** | **770,000.00** |